# Eitt ø er ikki bara eitt ø

## – marknaðarfólk til Føroya Banka

**Føroya Banki er ein ógvuliga væl grundaður og gjøgnumførdur banki á øllum økjum. Tak til dømis bókstavin ø í navni okkara. Ikki bara eitt ø, men ein væl umhugsað føroysk finessa, rótfest og førleikafest eins og Føroya Banki. Soleiðis eru vit, og hevur tú hug at gerast ein partur av starvsliði bankans, bjóða vit tær starv á marknaðardeild okkara.**

### Starvið
Sum marknaðarfólk í Føroya Banka arbeiðir tú verkætlanargrundað og ert við í toyminum, sum røkir nýggja og unga brand okkara, ið varð ment til samleikaskiftið í 2007. Tú fært bestu umstøður at hvessa tíni evni, eins og tú fært rúm og frið at skipa tínar arbeiðsuppgávur, so at tær hóska til títt arbeiðs- og sinnalag. Tín meginábyrgd verður at marknaðarføra vinnu- og íløguøki bankans og at skipa innanhýsis samskifti okkara. Í hesum seinna er møguleiki at leggja til rættis eina nýggja innanhýsis samskiftisætlan.

### Tú
Tú arbeiðir við eldhuga, dugnasemi og framsøkni, eins og bankin. Tú hevur persónliga slagkraft, sigur tína meining og heldur høvdið kalt, tá ið á leikar. Tú samstarvar væl og dugir at fremja ásett mál saman við tínum starvsfeløgum.

Harumframt hevur tú sjálvandi útbúgving ella royndir í marknaðarføring/samskifti, eins og tað er fyrimunur at hava royndir við verkætlanarleiðslu ella samskipan. Tú hevur góðan førleika at skriva bæði føroyskt og enskt.

### Føroya Banki og marknaðardeildin
Sum fyrsti børsskrásetti banki í Føroyum er Føroya Banki eitt nýmótans arbeiðspláss, ið virkar eftir altjóða virkisháttum. Marknaðardeildin, sum verður tín deild, hevur ábyrgd av samskifti og marknaðarføring bankans. Av spennandi uppgávum, sum deildin hevur staðið fyri, kunnu nevnast 100-ára hald bankans og samleikaskiftið í 2007. Á marknaðardeildini starvast í løtuni fimm fólk.

### Meira at vita
Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Poulu M. Kass, leiðara fyri marknaðardeildini, á tel 330 464 ella á pmk@foroya.fo.

Skrivlig umsókn saman við avriti av CV og prógvum skal sendast til: starvsfolk@foroya.fo ella til P/F Føroya Banki, Att: Bjarki Mohr, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn og vera okkum í hendi **í seinasta lagi 13. juni.**

SENDISTOVAN

FØROYABANKI



## LÍV søkir eftir næmingi

**Marknaðurin fyri lívstrygging og eftirløn í Føroyum er í stórum vøkstri. Fyri at kunna veita viðskiftafólki okkara bestu loysnirnar, søkir LÍV eftir næmingi.**

Sum næmingur hjá okkum verður tú partur av toyminum, ið stendur fyri eftirlønum og samskifti við viðskiftafólk okkara, har tú fert at tryggja teimum bestu tænastu í tøttum samstarvi við tínar starvsfelagar.

Vit vænta, at tú ert framsøkin, íðin og hevur góð samstarvsevni, eins og tú ert væl fyri í talu og skrift. Útbúgvingin tekur tvey ár og gevur breiðan førleika innan fíggjarheimin.

Tú skalt hava lokið students-, HF- ella HH-prógv. Fært tú prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Poul Christoffur Thomassen á tel 231 111 ella á pct@liv.fo

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juni 2008.

SENDISTOVAN

*LÍV er Føroya størsti veitari av lívs- og eftirlønartryggingum til føroyska arbeiðsmarknaðin. Í løtuni starvast 28 fólk á LÍV. Tryggingargjøldini vóru í 2007 288 mió. kr., og vit umsita eftirlønaruppsparing fyri 2,46 mia. kr.*

Føroya Lívstrygging · Kopargøta 1 · Postsmoga 206 · 110 Tórshavn
Tel. 311111 · Faks 351110 · www.liv.fo · liv@liv.fo

LÍV

# MONTØRUR

**Casa søkir eftir montøri at byrja beinanvegin.**

Casa er partur av Nema-samtakinum og bjóðar skrivstovuinnbúgv til virkir og stovnar, umframt sniðinnbúgv til heimið. Vit leggja dent á holla ráðgeving og fyrsta floks tænastu.

### Arbeiðið er bygt á toymi og fevnir um
- Montering og uppseting av møblum á verkstaði okkara og úti hjá kundum
- Flutningsuppgávur til og frá goymslum okkara
- Aðrar uppgávur í samráði við leiðaran í Casa
- Internar húsavarðaruppgávur
- Annað fyrifallandi arbeiði í hesum sambandi

### Yrkisførleikar
Vit vænta, at tú hevur royndir í yrkinum og hevur handverksligan førleika. Koyrikort er krav, og fyrimunur er eisini at kunna koyra trukk og lastbil.

### Eginførleikar
Tú ert fyrikomandi og skyldurøkin, sýnir áræði og ábyrgd, og tú arbeiðir sjálvstøðugt eins væl og saman við øðrum. Tú ert líkamliga væl fyri, tí starvið kann stundum vera kropsliga krevjandi.

Arbeiðsvikan er 40 tímar, og lønin verður sambært avtalu. Heldur tú, at starvið er nakað fyri teg, frætta vit fegin frá tær. Umsókn skal vera okkum í hendi innan mánadagin 16. juni og skal stílast til:

**NEMA**
Starvsfólkadeildin, att: Sam Jakobsen, HR-leiðara
Brekkutún 4
Postmoga 109
110 Tórshavn



NEMA

casa
www.casa.fo

SENDISTOVAN